# Gjørd gerð fær onga vend

“Ja, ja, eg komi beinanvegin,” segði eg og legði hornið á. Krista spurdi, hvør tað var, men eg hevði ikki tíð at svara. Rann bert út í bilin og koyrdi avstað. Var eitt sindur argur um at verða purraður út klokkan 04.32 leygarnátt. Men sama gjørdi. Tað ljóðaði á Óla løgreglumanni, sum at okkurt var heilt galið. Hann hevur ofta hug at gera av, tá ið hann fortelur, royndi eg at ugga meg við.

Nú kom SMS endiliga til sjóndar. Boðini vóru, at eg skuldi koma beinanvegin til Meinigheitshúsið. Avbyrgingarband var fyri innkoyringina á parkeringsplássunum uttan fyri Meinigheitshúsið, so eg setti bilin uttan fyri SMS. Eingin av arbeiðsfeløgunum, sum eg gekk framvið, høvdu hug at hyggja upp á meg. Øll sóu so syrgin út. Sámal og Klæmint, sum altíð vóru klárir at fortelja okkurt ella skemta, søgdu einki.

Óli stóð yviri við trappuna við Meinigheitshúsið. Eg fór skundisliga yvir. Tað var ein ræðuliga sjón. Helt meg hóma eitt fólk, men tað var ikki lætt at meta um, um tað var ein kona ella ein maður, tí so illa var hetta fólkið skamfarið, og blóðið fleyt um alla trappuna. Óli segði, at ein maður, sum æt Haraldur Joensen hevði ringt á støðina klokkan 04.00. Hann hevði verið í føðingardagsveitslu í grannalagnum og hevði parkerað bilin beint við trappuna, og tá ið hann bakkaði bilin út, hevði hann sæð okkurt á trappuni.

Aftan á at líkið var kannað, varð staðfest, at tað var ein kvinna. Hon hevði snuddir, sum vístu, at onkur hevði smekkað hana niður á trappuna fleiri ferðir, og at hon var deyð av einum snuddi, hon hevði fingið í høvdið. Læknin metti, at hon mundi vera deyð millum klokkan 24.00 og 04.00. Í lummanum hevði hon eitt visitkort, har tað stóð, at hon æt Sunniva Olsen, búði í Hoyvík og var sakførari.

Eg og Sámal vóru settir at kanna hetta málið, og longu tíðliga sunnumorgunin gjørdu vit av, at eg skuldi fara at tosa við mannin hjá Sunnivu og Sámal við Harald Joensen. Sámal kom aftur sum av torvheiðum. Haraldur visti einki at siga honum. Hann dugdi ikki at siga, um hon eisini hevði verið við í føðingardagsveitsluni, og hann hevði ikki hoyrt nakað ella sæð nakran á veg niðan til bilin.

Maður Sunnivu, Magnus, visti ikki um, at konan hevði nakrar óvinir, men sum hann segði, so hevði starvið, sum sakførari, við sær, at tú viðhvørt mátti taka óhepnar avgerðir, so hvør visti, um ikki onkur kundi vera beiskur um onkra avgerð, sum hon hevði tikið. Annars segði hann, at hon hetta kvøldið hevði verið í føðingardegi hjá eini vinkonu, og at hann ikki var farin við, tí at hann var so ringur av høvuðpínu.

Hann hevði koyrt hana oman í føðingardag, og avtalan var, at hon skuldi leiga ein hýruvogn heim aftur.

Tað vísti seg, at Sunniva og Haraldur bæði høvdu verið í sama føðingardegi. Eg fór at hugsa um, um hann møguliga var drápsmaðurin, men slerdi tankan frá mær, tí sjálvandi nýttist mær ikki at hava illgruna til Harald bara tí, at hann hevði verið í somu veitslu sum Sunniva. Haraldur var eisini kannaður niðri á løgreglustøðini somu náttina, og einki blóð var á klæðunum, og hví hevði hann ringt til løgregluna og boðað frá, um hann var drápsmaðurin? Nei, eg mátti heldur fara at kanna, hvussu viðurskiftini millum Sunnivu og Magnus høvdu verið.

Eg koyrdi yvir í Eysturbýin til Klokkaragøtu, har foreldrini hjá Sunnivu búðu. Tey tóku væl ímóti mær, sjálvt um tey sóu út til at vera ógvuliga illa fyri. Teimum hevði ongantíð dámt versonin og høvdu roynt at tosað Sunnivu frá at gifta seg við honum. Orsøkin var, at hann var so ástarøvundsjúkur. Hon hevði ikki lurtað eftir teimum og hevði gift seg, men tey høvdu ikki fingið nøkur børn. Seinni hevði hon mangan sagt, at hon heldur skuldi havt gjørt, sum foreldrini søgdu, men at nú var eingin vegur aftur. Foreldrini løgdu aftrat, at tey kortini ikki hildu, at Magnus kundi funnið uppá at dripið Sunnivu.

Tá eg møtti Sámali aftur, hevði hann, sum vit høvdu avtalað, verið og tosað við vinkonuna, sum hevði føðingardag, og við nakrar føðingardagsgestir. Vinkonan hevði ikki lagt nakað til merkis, men ein av gestunum segði, at einaferð hann fór út um at roykja, hevði hann sæð, at Sunniva stóð og tosaði við ein høgan, ljóshærdan mann. Hann helt ikki, at hetta var ein føðingardagsgestur, tí hann var í kowboybuksum og í skipstroyggju. Hetta mundi vera um tveytíðina, helt hann.

Haraldur var høgur og ljóshærdur, men sum eg hevði skilt, so var hann í veitsluklæðum hetta kvøldið, so tað kundi ikki vera hann. Ella hevði hann yvirhøvur verið í veitslu? Kendi hann vinkonuna hjá Sunnivu? Eg ringdi til hennara og spurdi, um hon kendi Harald Joensen. Nei, ikki meira enn tað, at hon visti, at hann hevði funnið Sunnivu og boðað frá. “Var hann ikki í føðingardegi hjá tær?” spurdi eg bilsin. Nei, ikki sum hon visti um.

Nú fóru tankarnir hjá mær á flog, og eg fekk nógv at passa saman. Sunniva og Haraldur høvdu prátað saman klokkan 02.00, og hann var í gerandisklæðum, so tað vil siga, at hann als ikki hevði verið í føðingardegi. Møguliga var Sunniva tá farin við honum niðan til bilin. So mátti okkurt vera hent har uppi, sum gjørdi, at Haraldur hevði dripið Sunnivu. Síðani hevði hann óivað verið við hús, skift klæði og vaskað sær, og so komin oman aftur og boðað frá drápinum. Men hví boðaði hann frá? Tað var mær ein gáta.

Òli løgreglumaður gav mær og Sámali loyvi at rannsaka húsini hjá Haraldi. Eg vónaði alla tíðina, at eg fór at finna tey blóðdálkaðu klæðini hjá Haraldi. Men vit høvdu ikki eydnuna við okkum. Ì húsunum var onki illgrunasamt at finna. Eg fór til hús við ringum tannabiti, og hóast eg næstan ikki hevði sovið í fleiri dagar, mundi eg ikki sovnað. Knappliga vaknaði eg av, at telefonin ringdi. Eg hevði sovið til døgurða. Òli var í telefonini og bað meg koma niðan á brennistøðina beinanvegin.

Inni á brennistøðini sótu Óli og Sámal og tosaðu við tveir menn. Á borðinum lá ein posi við einum blóðdálkaðum buksum og einari skipstroyggju. Annar av monnunum hevði sæð henda blóðdálkaða posan ímillum ruskið og vildi ikki brenna hann, men helt seg hava skyldu til at boða løgregluni frá.

Tá klæðini í posanum vórðu kannað, vísti tað seg, at blóðið stavaði frá Sunnivu, og hár frá Haraldi vóru eisini á klæðunum. Nú var lítil ivi um, at Haraldur var drápsmaðurin, og tá ið hann hoyrdi um øll prógvini, sum løgreglan hevði ímóti honum, viðgekk hann at hava dripið Sunnivu.

Sunniva og hann høvdu verið væl í eina tíð, og sama dagin, sum Sunniva var dripin, hevði hann verið inni í Eysturoynni í arbeiðsørindum. Tá hann kom til hús seint á kvøldi, sá hann, at Sunniva hevði ringt minst tíggju ferðir til hansara. Sjálvt um klokkan var farin av tólv, ringdi hann til hennara fartelefon. Tá var hon í føðingardegi og segði, at hon hevði okkurt at siga honum. Tey gjørdu av at møtast, og hon segði honum, at hon var við barn, og at hann var pápin, men at hon ikki vildi, at tey bæði skuldu koma saman longur. Hon ynskti at fáa barnið, men at liva saman við Magnusi, og at Magnus skuldi vera pápi at barninum. Meðan tey gingu niðan til bilin, royndi hann at greiða henni frá, at tað var hansara barn, og at hann eisini hevði nøkur rættindi, men Sunniva var hvørki til at høgga ella stinga í. Tá gjørdist hann so illur, at hann ikki visti, hvat hann hevði gjørt, fyrr hann stóð har blóðdálkaður, allur sum hann var.

Við bili kundi hann ikki fara heim, tí so svínaði hann hann til við blóði og til gongu heldur ikki, tí so fóru øll at síggja, hvussu hann sá út. Hann tók ein síðan frakka, sum lá í bilinum um seg og fór so til gongu til hús. Heima skifti hann klæði og vaskaði sær, men noyddist oman aftur eftir bilinum. Hann helt, at tað mundi vera best at fara í fín klæði, tí um onkur bar eyga við hann, so skuldu tey bara halda, at hann var ein av føðingardagsgestunum.

Júst tá ið hann tendraði ljósini og skuldi fara avstað, komu nøkur ungfólk gangandi framvið. Ein genta sá okkurt á trappuni og skríggjaði og veittraði til hansara, at hann

skuldi steðga. Fyri ikki at tykjast illgrunasamur, fór hann úr bilinum. Tað vísti seg, at bert hann hevði telefon, og tí mátti hann boða frá.

Haraldur Joensen fekk 5 ferðir lívlanga fongsulsrevsing, uttan møguleika til royndarleyslating.

*Bartal Jógvan Gregersen, Stranda Skúli 10.a*
*Fartlf. 268189*